DAGSINS MEINING

Ein ótryggari heimur vi› Bush

Amerikanska forsetavali› gjørdist ein gysari. Sjáldan hevur ta› sta›i› so javnt millum tvey forsetavalevni Í løtuni er ógreitt, um n‡ggi amerikanski forsetin eitur Bush ella Gore. Val hevur eisini veri› til kongressina Her hava republikanararnir vunni› tepurt. Møguleiki er tí fyri, at republikanski flokkurin fer at hava buktina og bá›ar endar. Ta› kann neyvan ver›a gott fyri demokratii›, um republikanski flokkurin fær valdi› bæ›i í Hvítuhúsunum og í teimum bá›um kømurunum í kongressini.

Flestu eyglei›arar og stjórnarlei›arar í Europa seta sítt álit á, at uppteljingin í Florida fer geva Gore meirilutan. Eitt USA vi› Bush sum forseta fer at skapa óvisssu og ótryggleika í heiminum, nú ta› ver›ur rokna› vi›, at Bush fer at reka ein isolatoriskan politikk. Hyggja vit at, hvat republikanarin Bush stendur fyri, so er eisini orsøk til at óttast. Tí hesin óroyndi republikanarin kann koma at seta kíla í ta vælfer›arskipan, sum demokratarnir hava roynt at byggja upp seinastu árini vi› m.a. eini betri sosialari trygdarskipan og einum útbygdum útbúgvingarverki.

Ta› er ikki serliga hugaligt at ímynda sær ein høgravendan republikanara í Hvítu Húsunum komandi f‡ra árini, sum eisini hevur alt valdi› í Kongressini. Tí ta› gevur hansara, eftir europeiskum hugsanarhátti og leisti, asosiala og mannarættindafíggindaliga politikki vind í seglini og ta› lovar ikki gott fyri demokratii› í heimsins mætastu tjó›.

Bush er dyggur mótstø›uma›ur í abortspurninginum, og ta› kann koma at hava álvarsligar menniskjansligar avlei›ingar. Bush er so eisini kendur fyri, at vilja geva øllum amerikarum loyvi at bera vápn uttan nakrar restriktiónir. Hetta kann eisini koma at at fáa avlei›ingar fyri kriminalitetin. At komandi amerikanski forsetin hevur met í avrættingum í sínum egna heimstati er eisini naka›, sum man geva mongum vesturepeara høvu›br‡ggj. Ta› er tankavekjandi, at ma›urin í hesum heimsins mest t‡andi embæti, skal vera tann politikarin, sum hevur sent flest borgarar í elektriska stólin.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

60 ár

Leygardagin fylti Re›in Leonson, sitandi s‡sluma›ur í Vágum, 60 ár. Re›in er ein kendur ma›ur í landinum, hann hevur veri› heili 31 ár løgregluma›ur og tískil hevur hann eisini havt samband vi› eina rúgvu av føroyingum.

Starvsfelagar og vinir siga, at Re›in er ein sera gestablí›ur ma›ur og hann dugir væl at tosa vi› fólk. Hann er kanska í tí dagliga ein heldur álvarsamur ma›ur, men kann eisini vera skemtingasamur, tá gó›a lag er.

Regin er sørvingur og hann er sonur politikkaran Leon Joensen. Í frítí›ini, serliga ta gó›u árstí›ina, so er Regin nógv at síggja í Mikinesi. Har eigur hann eini frítí›arhús og hann trívist væl í hesi fjarskotnu og avbyrgdu bygd.

Re›in er giftur og eigur tvey børn, ein son og eina dóttir. Sonurin hevur fylgt fótasporum pápans og er eisini løgregluma›ur.

Re›in avloysir Regin Jespersen sum s‡sluma›ur í Vágum.

je

25 ára starvsdagar

Fyrr í ár hava Johannes Mortensen, Nancy Joensen og Sigrun Simonsen á Tænastumi›stø›ini hjá Føroya Tele havt 25 ára starvsdag.

Tænastumi›stø›in er tann parturin av Føroya Tele, sum heldur til í gomlu telegrafstø›ini á Tinghúsvegnum.

Í innanh‡sisbla›num hjá Føroya Tele, Krossfelti›, ver›ur sagt, at felags fyri tey øll er, at tey hava veri› burturi frá stovninum í tí›arbilum - og tí fevna tey 25 starvsárini yvir fleiri ár.

Onkur teirra kom á Telefonverki› í fimmtiárunum, og eru vend aftur eftir at hava starvast a›rasta›ni, og onkur annar hevur veri› heima hjá børnum.

Treytir fyri valgreinar

Nú tí›in styttist til b‡- og bygdarrá›svali› 21. november, eru vit her á bla›num vi› at ganga undir í valgreinum. Hóast vit seinastu dagarnar hava prenta› fleiri sí›ur vi› valtilfari›, liggja framvegis um 75 greinar eftir.

Øll valevni eru kortini vælkomin at senda okkum tilfar, men vit kunnu kortini ikki lova, at tilfari› kemur í bla›i›, tá valevni ynskja ta›.

Fyri at bøta um henda trupulleika hevur bla›lei›slan gjørt av, at valtilfari› ikki skal fylla meira enn álei› eina A4 sí›u - ella umlei› 2.800 tekn. Saman vi› valgreinum kann prentast andlitsmynd av valevninum. Annar grafikkur ver›ur ikki tikin vi›.

Roknast kann ikki vi› at fáa valtilfar í leygardagsbla›i›.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta›
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Friggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Alibátur til Skotlands

Hydro-Tech á Ei›i læt um vikuskifti› tann fyrra av tveimum alibátum til Skotlands. Báturin er tann áttandi, sum er smí›a›ur á Ei›i

ALIBÁTUR
Edvard Joensen

Ein tvíkilja, sum smí›a› er á føroyskari smi›ju, var› seinasta vikuskifti latin skotskum alifelag. Og tann næsti skal avsta› í december.

Samstundis sum skrokkurin til n‡ggju sandoyarferjuna var á veg til Føroya, fór ein n‡bygningur hinvegin. Av Ei›i til skotsku vesturstrondina, har hesin n‡ggi báturin skal arbei›a hjá einum skotskum alibrúki.

Ta› er Hydro-Tech á Ei›i, sum hevur smí›a› hendan bátin. Báturin er tann áttandi alibáturin, smi›jan hevur lati›. Hinir sjey eru allir í Føroyum. Men tann næsti, sum latin ver›ur, skal eisini til Skotlands. Ta› er sama felgi›, i› fekk hendan, sum nú fór, sum eisini skal hava nummar níggju í rø›ini.

Bátarnir eru seldir einum alibrúki á skotsku vesturstrondini, inni á meginlandinum, sunnanvert Hebridurnar. Báturin var› latin á Ei›i, har skotskt flutningsfelag tók yvir. Hann var› sigldur til Havnar, fluttur vi› Lómi til Scrabster og sí›an sigldur eystur um og vestur aftur gjøgnum Caledonsku Siglingarrennuna til lítlu bygdina Fine, har alistø›in liggur.

Hydro-Tech er partur av samtakinum KJ Hydraulik á Kamsdali og Hydro-Tech á Ei›i. Feløgini eru løgd saman vi› felags lei›slu. Á Kambsdali ver›ur arbeitt vi› hydraulikki, me›an smi›juarbei›i› ver›ur gjørt á Ei›i.

Felagi› hevur fyrr flutt nakrar skrokkar til tvíkiljurnar inn úr Letlandi. Men hesum eru teir givnir vi› nú, tí teir meta seg kunna gera arbei›i› sjálvir á Ei›i. Báturin, sum fór til Skotlands seinasta vikuskifti, var tann seinasti lettiski skrokkurin. Tann næsti, sum latin ver›ur, er gjørdur á Ei›i, allur sum hann er. Tann skrokkurin er í løtuni til sandblásing í smi›uni hjá Ragnari Poulsen vi› Ljósá, har allir skrokkarnir, Hydro-Tech hevur lati›, eru vor›nir sandblástir og mála›ir.

Bátarnir, Hydro-Tech hevur gjørt, eru allir stálbátar uttan ein, sum er úr aluminium. Men líkt er til, at stálbátarnir eru heldur betri egna›ir til alivinnuna, tí aluminiumsbáturin er væl lættari. Ta› ger til dømis, at hann liggur lættari í sjónum og er tí heldur torførari at halda vi› ringarnar. Eisini er hann ein mun d‡rari at gera enn stálbátarnir.

Ta› ver›ur láti› væl at bátunum, sum Hydro-Tech hevur lati›. Teir eru arbei›sligir, væl útgjørdir og ikki minst tryggir. Teir hava ongan trupulleika av nokk so stórum kranum umbor›.

Undir hálvtekju av stáli

Hvussu ver›a tær 400.000 kr., sum eru settar av til Tjørnuvíkarvegin í verandi fíggjarári, brúktar, vil Jákup Suni Joensen hava at vita

POLITISKUR FYRISPURNINGUR
Ólavur í Beiti

Jákup Suni Joensen, løgtingsma›ur, vil hava at vita frá fer›slumálará›harranum, hvussu tær 400.000 kr., sum eru settar av til Tjørnuvíkarvegin í verandi fíggjarári, ver›a brúktar.

Í vi›merkingunum sigur Jákup Suni Joensen, at á fíggjarlógini fyri ár 2000, stendur, at settar eru av kr. 400.000 til vegin til Tjørnuvíkar.

– Nú er líti› eftir at hesum fíggjarári, og enn er arbei›i› ikki fari› í gongd á nevnda vegastrekki. Peningurin man tí roknast at vera óbrúkt- ur og fellur aftur til landskassan, um arbei›i› ikki ver›ur gjørt fyri n‡ggjár, sigur Jákup Suni Joensen.

Omanlop

Og ví›ari vísur hann á, at endamáli› vi› hesari peningajáttan man fyrst og fremst vera at tryggja ta› petti› av omankoyringini til Tjørnuvíkar, sum liggur serliga illa fyri vi›víkjandi omanlopi og grótskri›u, serliga um veturin.

– Ein hugsandi máti at tryggja hetta ábæra uml. 300 metrar langa vegapetti› kundi veri›, at lagt ta› undir hálvtekju av stáli, i› nú er vanligt a›rasta›ni, sigur Jákup Suni Joensen í vi›merkingunum.

Tí›indaskriv

Evnisdagur um starvsfólkapolitikk

Løgmansskrivstovan fer 15. november at skipa fyri einum evnisdegi um starvsfólkapolitikk.

Anfinn Kallsberg, løgma›ur byrjar dagin vi› at hava innlegg um t‡dningin av at hava starvsfólkapolitikk á almennu arbei›splássunum.

Evnisdagurin, sum ver›ur á Hotel Føroyum, er fyri lei›arar og starvsfólk, sum arbei›a vi› starvsfólkavi›urskiftum.

Evnisdagurin fer serliga at snúgva seg um íverksetan av starvsfólkapolitikkinum og fer at leggja dent á at l‡sa og vi›gera spurningar sum: Hvat skal til fyri at fáa starvsfólkapolitikkin at virka? Hvørjar møguleikar gevur starvsfólkapolitikkurin? Hvørja ávirkan kann starvsfólkapolitikkurin fáa ? osfr.

Umframt íverksetan av starvsfólkapolitikkinum, ver›a hesi evni vi›gjørd: *Gongdin í starvsfólkapolitikkinum*, Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri. *Løgfrø›iliga stø›an hjá starvsfólkapolitikkinum*, Rúni Joensen, deildarstjóri *Lyklatøl úr frágrei›ingini um starvsfólkapolitikk*, Barbara á Tjaldrafløtti, deildarstjóri. *Íverksetan av starvsfólkapolitikkinum, - Royndir, - For›ingar, - Flytingar*, Helgi Rasmussen, vinnulívssálarfrø›ingur. *Tiki› ver›ur samanum*, Anfinn Kallsberg, løgma›ur.